Søkt verður eftir

# Sølu- og marknaðarstjóra

til Pf. Postverk Føroya

## Uppgávan

Pf. Postverk Føroya stendur á gáttini til eina nýggja, spennandi og avbjóðandi framtíð, nú stovnurin er umskipaður til partafelag.

Pf. Postverk Føroya søkir í tí sambandi eftir sølu- og marknaðarstjóra, sum fær høvuðsuppgávuna at mynda og samskipa sølu felagsins úr enda í annan. Starvið sum sølu- og marknaðarstjóri er beinleiðis avleiðing av strategisku menningini, ið er sett í gongd á Pf. Postverki Føroya.

Nýggi sølu- og marknaðarstjórin fær stóra ávirkan á, hvussu sølu- og marknaðararbeiðið skal mennast, og fyrsta avbjóðingin verður at seta á stovn sølu- og marknaðardeild, har eisini vørumenning og branding hoyra til. Tú tekur virknan lut í stjórn felagsins og fært tískil beinleiðis ávirkan á tær framtíðarstrategiir, ið verða lagdar fyri fyritøkuna.

## Førleiki

Tú hevur í minsta lagi 5 ára hóskandi starvsroyndir, og tað er ein treyt, at tú kanst vísa á úrslit innan sølu og leiðslu. Títt eyðkenni er m.a., at tú røkkur tey mál, tú setur tær. Tú dugir væl at fáast við fólk, og hevur sostatt lætt við at skapa støðugt samband við viðskiftafólk og -stovnar.

Tú sært møguleikar heldur enn forðingar, samstundis sum tú ert før/ur fyri at arbeiða á ein bæði skapandi og ítøkiligan hátt. Umframt hóskandi útbúgving hevur tú kanska eisini royndir innan CRM, og hevur greiða fatan av møguleikunum innan KT.

## Pf. Postverk Føroya bjóðar tær

eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í umhvørvi við nýmótans leiðsluhátti. Talan er um eitt krevjandi starv, og tí bjóða vit tær eina góða løn, samsvarandi førleika og royndum.

Pf. Postverk Føroya

Pf. Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 60 00 · Fax: 34 60 01 · postur@postur.fo · www.postur.fo

## Umsókn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Sofus Clementsen stjóra á tlf. 23 61 31 fyri at fáa meira at vita um starvið. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við hóskandi prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi fyri 16. oktober 2006 og skulu sendast til:

Pf. Postverk Føroya
att: Sofus Clementsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

ella um teldupostin til :
postur@postur.fo

Postverk Føroya

---

# LEIÐARI TIL 2X3



## HEVUR TÚ HUG AT LEIÐA 2X3 INN Í FRAMTÍÐINA

**Sum leiðari**
Fært tú latið upp í hendur at menna og leiða ein sera áhugaverdan handil. Tú fært ábyrgd og leiðslu av dagliga rakstrinum í handlinum, og við málsøkni og planlegging skal tú tryggja, at 2x3 konceptið við nøktandi úrsliti røkkur málum, sum tú verður við til at seta.

**Uppgávur tínar**
Fevna um leiðslu, planlegging og menning av øllum rakstrarøkjum, ið hava beinleiðis samband við vanliga raksturin av 2x3. Tú skal umboða handilin úteftir, samstundis sum tú skalt virka fyri, at drívmegi er í handlinum, soleiðis at málini verða rokkin.

**Vit krevja**
At tú ert ein álítandi persónur, sum hevur evnini at leiða eitt virkið arbeiðspláss. Tú hevur fakligu evnini, áræði og kreativitetin, ið skal til fyri at reka ein handil í eini vinnugrein, ið er merkt av sera harðari kapping. Tú hevur evnini at brynja 2x3 til avbjóðingar, ið liggja fyri framman. Tað skal fella tær náttúrligt at arbeiða sjálvstøðugt, og at skipa arbeiðisviðurskifti hjá øðrum.

**Tínar kvalifikatiónir**
skulu byggja á hægri útbúgving innan øki, ið mugu metast at stuðla tær í einum starvi sum leiðandi persónur. Royndir innan vinnulív, t.d. leiðslu í eini profitskapandi organisation og fakkunnleiki innan byggimarknað e.l. eru sera viðkomandi.

**Frá okkum**
Fært tú bjóðað eitt sera spennandi og vælønt starv, har tú innan tryggar karmar verðuliga fært møguleikan at royna tíni evni. Í samstarv við stjóra verður tað tú, ið skalt fyriskipa flestu viðurskifti í 2x3.

**Freistin**
At søkja starvið er 30. september 2006. Miðjað verður eftir at seta starvið í seinasta lagi tann 1. december 2006. Umsókn saman við viðkomandi skjølum, skal sendast til:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Boks 3038
110 Tórshavn
Att: Jørmann Petersen, stj.

2X3
TIMBUR HT HANDILIN
TÓRSHAVN • KAMBSDALUR